Virðingin fyri róðrarfólkunum skal verða størri

Bæði í NSÍ róðrarfelagnum og í Róðrarsambandinum staðfesta tey, at tað er ivi um, hvør hevur ábyrgdina av at fáa óviðkomandi bátarnar at halda seg burtur, so teir ikki órógva kappróðurin á Skálafjørðinum

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Meðan róð verður kapp á Skálafjørðinum verða óviðkomandi skip og bátar biðin um at halda seg burtur frá róðrarøkinum, sum er avmerkt, og sum vaktarhald er rundanum. Nakað soleiðis plagar lýsingin at ljóða í útvarpinum frá sýslumanninum og havnarmeistaranum í økinum, har tað verður róð kapp.

Men tað verður aftur og aftur staðfest, at henda áheitanin ella rættari hesi boðini verða ikki tikin í tí álvara, sum tey eiga at verða tikin í. Ikki minst ger hetta seg galdandi á Skálafjørðinum, har riðilin, sum fylgir við róðrinum, plagar at vera so stórur, sum hann kanska onga aðra staðni er.

Bátarnir ið fylgja við kappóðrinum, eru ein trupulleiki, sigur Sofus T. Hansen, formaður í Kappróðrarfelagnum NSÍ

– Vit harmast nógv um hetta. Á Skálafjørðinum taka teir fyrireikingarnar til róðurin í sera stórum álvara. Tað plaga teir at gera, og tað hava vit fyri langari tíð síðani fingið fatan av, at teir eisini gera hesa ferð. Men tað ber hvørki teimum ella okkum í Róðrarsambandinum til at halda óviðkomandi burtur frá róðrarøkinum, og tað er spell, at bátarnir eru so nærgangandi, sum vit aftur og aftur hava sæð, at teir hava verið. Vit vóna sanniliga, at hetta verður betur hesa ferð, enn tað plagar at vera, men vit halda ikki, at tað er okkara uppgáva ella ábyrgd at halda teimum burtur.

Hetta sigur Hannis Joensen, sum er formaður í Róðrarsambandinum.

Ov lítil virðing

Sofus T. Hansen er formaður í Kappróðrarfelagnum NSÍ. Hann sigur, at bátarnir, sum fylgja við kappróðrinum eru ein trupulleiki:

– Tá teir fylgja sjálvum róðrinum gongur tað ikki so ógvuliga skjótt fyri seg, men tað er ein trupulleiki, at teir eru so mikið nær, at teir trýsta vaktarbátin ella bátarnar og bátin við útvarpsmanninum nærri róðrarbátunum. Størsti trupulleikin eru aldurnar. Ímillum róðrarnar stima skjótt gangandi bátarnir við fullari ferð aftur og fram. Tá koma nógvar aldur frá teimum. Tað er so mikið stutt millum róðrarnar, at aldurnar hava ikki lagt seg, tá næstu kappróðrarbátarnir koma skúmandi, og tað er til ampa fyri róðrarmanningarnar.

Og Sofus T. Hansen heldur fram:

– Aldurnar eru heilt víst við til at avgera úrslitið av róðrinum. Tað vil við øðrum orðum siga, at manningarnar, sum hava vant í fleiri mánaðir, fáa ikki loyvi til í innanhýsis og javnari kapping uttan uppíblanding at gera av ímillum sín, hvør er stinnastur. Tað halda vit vera sera spell, og vit halda, at manningarnar á óviðkomandi bátunum harvið vísa kappróðrarmanningunum ta virðing, sum tær hava uppiborið. Tað er duppult spell, tí veruleikin helst er tann, at tey, sum sigla á fjørðinum skulu eitast at hava stóran áhuga í kappróðri.

Ivi um ábyrgdina

Hannis Joensen sigur, at tað hevur verið tosað aftur og fram um, hvør tað er, sum hevur ábyrgdina av, at kunngerðin um at óviðkomandi bátar skulu halda seg burtur, verður hildin, men eingin niðurstøða er gjørd um hetta.

– Vit halda, at tað er so líka til, at teir, sum hava kunngerðina í útvarpinum, syrgja fyri, at hon verður hondhevað. Tað eru havnarmeistarin og sýslumaðurin. Havnarmeistarin hevur ikki politi myndugleika, og sýslumenninir siga, at myndugleikin hjá teimum í flestu førunum ikki fer út um kajkantin. Á fjørðinum halda teir, at ábyrgdin er hjá Vaktar– og Bjargingartænastuni. Men higartil hava teir ikki tikið sær av hesum.

Verður vaktarbáturin ikki virdur?

– Ikki so nógv, sum vit fegnir høvdu viljað, at hann varð virdur. At vit nú undan kappróðrinum í kanska besta økinum í landinum hava hetta frammi í pressuni fer vónandi at hava við sær, at virðingin verður størri og ampin av óviðkomandi bátum harvið minni, enn hann hevur verið. Um talan ikki verður um nakra broyting, so mugu vit taka málið upp til nýggja viðgerð, heldur Hannis Joensen.

Alt er púra opið

Tað verður roknað við, at munurin ikki fer at verða so stórur, sum hann var í Klaksvík, og at har, sum tað var tætt í Klaksvík, verður møguleiki fyri nýggjum vinnarum

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Undanfarnu sumrini hevur tað ofta verið soleiðis, at somu manningar hava vunnið aftur og aftur. Tað kann væl vera, at vinnararnir fara at verða teir somu á Skálafjørðinum, sum vunnu á norðoyarstevnu. Men fleiri, sum fylgja væl við í kappróðri, halda, at talan verður um heilt øðrvísi kapping í dag, enn tað var fyri fjúrtan døgum síðani.

Fleiri veruleikar gera, at tað er sannlíkt við heilt øðrum kappingum hesa ferð. Fyri tað fyrst verður tað soleiðis hesa ferð, at bestu bátarnir fara at liggja í miðjuni. Á norðoyarstevnu varð í lutakasti gjørt av, hvussu raðfylgjan skuldi vera. Fyri tað næsta má roknast við, at róðrarlíkindini verða betri, enn tey vóru í Klaksvík (síðani leygardagin fyri fjúrtan døgum síðani hevur verið av fínasta veðri kring landið), og so er tað ein veruleiki, at 10–mannaførini hesa ferð skulu rógva tvey túsund metrar og ikki fimtan hundrað, sum tey róðu í Klaksvík.

5–mannafør dreingir

Á norðoyarstevnuni vann Fípan Fagra fyri fyrstu ferð í nógv ár. At klaksvíksdreingir vunnu hevur sjálvandi havt við sær, at áhugin fyri at venja og fyrireika seg er vorðin uppaftur størri, enn hann var (um tað ber til!).

Men Fípudreingirnir eru fyrireikaðir uppá, at mótstøðan verður stór. Ikki minst verður roknað við, at FM vinnararnir tvey tey seinastu árini, Tjaldrið, kann gera um seg í heimasjógvi. Tjaldrið hevði vánaligan start í Klaksvík. Teir søgdu seg missa nøkur tøk, tí tað gekst teimum so illa at koma leysir av fasta startinum. Tí løgu teir aftarlaga eftir fyrsta spurtin, men teir stríddu seg kortini fram á næstfyrsta plássið, og tað kundi bent á, at teir fara at bjóða Fípuni Føgru av hesa ferð.

6–mannafør kvinnur

Nýggi Jarnbardur vann í stórum stíli á norðoyarstevnu. Tær vunnu FM í 1999 og í 2000. Í fjør vórðu tær steðgaðar av nýggja Páll Fanga, sum vant burturúr øllum hinum.

Páll Fanga kvinnurnar vóru ikki nøgdar við sítt avrik á norðoyarstevnu. Tær søgdu seg kenna tað, sum um tær róðu í siropi, og síðani tá hevur talan verið um sjálvrannsakan.

Tað hevur undanfarnu árini vísti seg, at tær manningarnar, sum nakrar fáar vikur undan norðoyarstevnuni hava verið á Scilly oyggjunum, hava havt lít við at finna rætta stevið. Venjingin við serliga Scilly bátinum, ferðingini og so nógv annað hava gjørt, at tað hevur tikið sína tíð at finna áralagið og alt annað aftur umborð á føroyska kappróðrarbátinum. Tað hava tær umborð á Páll Fanga havt fjúrtan dagar til síðani norðoyarstevnuna, og so fæst at siggja, um tær og aðrar manningar verða førar fyri at bjóða Jarnbardi av hesa ferð.

Á triðja plássinum í Klaksvík var Riddarin úr Miðvági. Tær vóru væl við í kappingini um næstfremsta plássið, og tí má eisini roknast við teimum hesa ferð.

Sølmundur var ikki við í Klaksvík, men nú er hann mannaður aftur.

5–mannafør gentur

Sílið vann so sannførandi sigur á norðoyarstevnu, sum tað neyvan er sætt áður. Tær vóru tjúgu sekund fyrri á mál enn næstu bátarnir. Genturnar umborð á Fípuni Føgru vóru meistarar í fjør, tá tær vunnu allar róðrarnar uttan á ólavsøku. Tær vóru næstfremst í síðsta róðrinum.

Munurin verður kanska ikki so stórur hesa ferð, sum hann var fyri tveimum vikum síðani, men út frá úrslitunum seinast kann ikki roknast við øðrum, enn at tær umborð í Sílinum eru størstu favorittarnir av øllum, sum fara at rógva á Skálafjørðinum.

6–mannafør menn

Í fjør vóru tað kvinnurnar í Klaksvík, sum vunnu nógv við Fípuni Føgru og Páll Fanga. Á norðoyarstevnu vóru tað menninir, sum vunnu. Smyril úr Vági var næsti kappingarneytin hjá monnunum umborð á Pálli Fanga, og Gongurólvur var væl við.

Síðsta sunnudag róðu nakrir bátar kapp á Strondum. Tá var mest spennandi kappingin millum 6–mannaførini. Páll Fangi luttók ikki. Í staðin vóru tað FM vinnararnir í Stráluni, sum vunnu. Á norðoyarstevnu vóru teir ikki millum teir fremstu. Strálan var leingi meiri enn eina bátslongd frammanfyri Gongurólv, men í endaspurtinum vóru havnarmenninir teir raskaru, og á málinum var munurin bara rongin.

8–mannafør

Nýggi Argjabáturin vant burturúr øllum hinum. Nýggi Kvívíkingurin royndi at bjóða av. Men teir vóru ikki nóg drúgvir.

Í fjør var Nevið Reyða FM vinnari. Klaksvíksbáturin luttók ikki á norðoyarstevnu. Hann verður við í dag. Tað eru róðrarfólk í Kappróðrarfelagnum NSÍ, sum hava mannað bátin. Manningin er fyri tað mesta teir, sum í 1998 og í 1999 vóru við til at manna Eysturoyingin, sum tá var nýggjur og vann allar róðrarnar.

Nevið Reyða er tilmeldað fyri róðrarfelagið í Klaksvík, so tað verður ein Klaksvíks sangur, sum verður at hoyra, um Nevið vinnur. Men sannlíkið man ikki vera so stórt fyri, at Nevið Reyða fer at vinna á Skálafjørðinum. Teir hava bara verið seks ferðir í bátinum, síðani hann fór úr Klaksvík og út á Glyvrar.

10–mannafør

Eysturoyingurin kom so at siga afturíaftur í Klaksvík. Eftir sigrarnar í 1998 og í 1999 gekk tað illa hjá FM manninginni í 2000. Í fjør varð báturin mannaður av nýggjum, og nú tykjast teir vera væl fyri.

Næstu avbjóðararnir hjá Eysturoyingunum í Klaksvík vóru Havnarbáturin og Klaksvíkingurin. Altso vóru bátarnir úr trimum teimum størstu kommununum í landinum fremstir.

Á Strondum luttóku bara tvey 10–mannafør. Eysturoyingurin var eins nógv frammanfyri Nólsoyingin, sum hann var í Klaksvík. Ikki minst tá 10–mannaførini kappaðust á norðoyarstevnu varð tosað um, at umstøðurnar kanska spældu eitt puss. Ta ferðina var Eysturoyingurin vestastur, og Havnarbáturin var eystastur. Tí var tað eitt sindur torført at taka bestikk av støðuni. Tað verður hópin lættari hesa ferð. Eysturoyingurin fer at hava Havnarbátin í øðrum borðinum og Klaksvíkingin í hinum borðinum, og so skal Vestmenningurin ikki gloymast. Hann var fremstur, tá tað víkuskiftið undan norðoyarstevnu varð kappast á Skála, og eingin roknar við, at hann eina ferð afturat fer at fáa eitt so vánaligt úrslit, sum hann hevði í Klaksvík.

Ólavsøkuspenningurin komin til Runavíkar

Sigurin á Svangaskarði hevur fyrsta finaluplássið nakrantíð til NSÍ við sær, og nú eru fyrstu atgongumerkini út í Europa nógv nærri, enn tey nakrantíð hava verið áður

HÁLVFINALA B68–NSÍ
Jóannes Hansen

Tað er Skálafjarðarstevna í Runavík í hesum vikuskiftinum. Og tað vil so væl til, at fótbóltsfepurin er hægri í stevnukommununi, enn hann nakrantíð hevur verið áður. NSÍ er næstfremst í landskappingini, og hóskvøldið spældu teir seg í steypafinaluna – tað fyrstu síðani farið varð undir kappingina um løgmanssteypið. Harvið kunnu vit staðfesta, at samstundis sum teir halda stevnu í Runavík, so er fótbóltsspenningurin næstu sjey vikurnar varðveittur.

Finaluplássið ger, at NSÍ hevur tikið eitt risafet ímóti fyrstu Europa Cup luttøkuni. Hon gerst veruleiki, um NSÍ vinnur steypafinaluna, og hon kann gerast veruleiki, um NSÍ tapir steypafinaluna.

Borð um borð

Kappróðurin hevur stóran áhuga í Runavík. Og um vit brúka kappróðrarmyndina upp á seinnu hálvfinaluna á grasinum í dýrdarveðrinum hóskvøldið, so róðu liðini borð um borð fyrstu smáu fimmti minuttirnar. So kom hol á, og so var tað sera hendingarríkt og undirhaldandi.

Tíverri, kunnu vit siga, kom einki mál í 1. hálvleiki. Hevði fyrsta málið komið beinanvegin, so hevði fyrra umfarið ivaleyst eisini verið undirhaldandi. Men einki mál kom, og so varð spælið keðiligt, sjálvt um tað var stórur spenningur í. Báðir partar løgdu størstan dentin á at verja og at ansa eftir, at mótparturin ikki fekk fyrimunin av at koma á odda, og persónligu mistøkini vóru nógv.

Uppløgdu málmøguleikarnir vóru fáir og smáir. Jens Martin Knudsen og Michal Kokoszanek tóku sær av nógv teimum flestu innleggunum, sum ikki vóru so ógvuliga mong. Arnold Joensen hjá B68 kom leysur í høgru nakrar ferðir. Hann legði oftast til nærra stólpan, men áløpsmenninir hjá B68 vóru ikki á rætta staðnum røttu løtuna. Størsta møguleikan fekk Øssur Jacobsen, tá hann eftir álop í høgru og innlegg frá Marlon Jorge kom leysur í vinstru, men royndin úr spískum fór dygst omanfyri.

Hjá NSÍ sendi Gert Langgaard eftir hornaspark uppum, og Brynjolvur Nielsen sendi fríspark omanfyri.

NSÍ setti treytirnar

Bara tríggir minuttir vóru farnir av seinna umfarinum, tá NSÍ fekk hol á. So skuldi B68 skora tvær ferðir, um teir skuldu røkka finaluplássinum. Tí var neyðugt hjá teimum at sleppa alt meiri í verjupartinum, og tað hevði við sær, at spentar støður stóðust í báðum endum, og tá er stuttligt at vera áskoðari. Eftir at NSÍ var komið framum, skifti B68 frá 4–4–2 og til 4–2–4, og tá NSÍ var komið upp á 2–0, var verjuparturin hjá B68 heilt tunnur (Hans Fróði Hansen var fremsti maður), og fimm og viðhvørt seks spælarar vóru í fremstu røðini.

B68 minkaði um munin til 2–1, tá tað restaðu seytjan minuttir, og hóast tað var neyðugt hjá teimum at skora tvey mál afturat, um teir skuldu vinna finaluplássið, so var tað heilt spennandi. Fimm minuttir undan leikloki økti NSÍ til 3–1. Tá tóktist sum um alt var avgjørt, men B68 svaraði enn eina ferð aftur, og seinni hálvleikur gjørdist sum heild rættuliga undirhaldandi og einum steypadysti verdugur.

Málini

Óli Hansen skoraði til 1–0. NSÍ hevði horna í vinstru, B68 málverjin boksaði út frá, bólturin varð sendur aftur í vinstra borð og hagani til handara stólpan, har miðframherjin, sum ikki hevði verið serliga sjónskur, var púra leysur, tá hann sendi framvið nærra stólpanum og upp undir nettakið, og harvið hevði Óli útinnt tað, sum tað verður roknað við, at hann skal gera.

Sonni L. Petersen skoraði til 2–0 úr 20 metrum. Hann fekk tak á eftir langa sending, sneiddi framvið einum og fangaði málverjan á skeiva beininum. Royndin var ikki serliga sannførandi, men bólturin smoygdi sær inn við stólparótini.

Marcello Marcellino er ein snillingur við bóltinum. Trupulleikin hjá B68 er, at hann so at siga ongantíð er tøkur. Hesa ferð spældi hann 35 minuttir, og hann minkaði um munin við fínum langskoti úr 18 metra fjarstøðu.

So trýsti B68, men tá teir vóru ósketnir og spældu Sonna L. Petersen púra leysan, endaði tað við, at dómarin bríkslaði fyri brotsparki. Brynjolvur Nielsen, sum annars hevði til uppgávu at taka sær av Øssuri Hansen í vinstru, sendi flatt í netið.

Tá B68 tveir minuttir seinni fekk brotsspark, tók Øssur Hansen uppgávuna úr ellivu metrum á seg. Jens Martin Knudsen tveitti seg til høgru fyri seg sjálvan og hálvbjargaði, men Øssur Hansen var fyrstur á returinum. Í evstu løtu hálvbjargaði Jens Martin Knudsen frísparksroynd frá Øssuri Hansen. John Heri Dam sendi returin úr spískum í høgru og á samankomingina, men B68 kom kortini ikki nærri enn 3–2, og so fegnaðust innan menninir, sum longu eru farnir at gleða seg til ólavsøkudag. Tá fara teir fyrst at hyggja at, meðan Torbjørn, Bill og allir hinir fara at ganga í skrúðgongu, og so fara teir á Tórsvøll at taka á við NSÍ. Vónandi verður veðrið eins blítt, og tað var hóskvøldið.

B68–NSÍ 2–3 (0–0)

2. hálvfinala í kappingini um løgmanssteypið

0–1: Óli Hansen 48.
0–2: Sonni L. Petersen 66.
1–2: Marcello Marcellino 73.
1–3: Brynjolvur Nielsen br 85
2–3: Øssur Hansen 87.
Dómari: Lassin Isaksen
B68: Michal Kokoszanek – Jan Petersen (Oleif Joensen, 32.), Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, John Heri Dam – Arnold Joensen, Jann Ingi Petersen (Fríðin Ziskason, 66.), Marlon Jorge, Øssur Hansen – Fróði Benjaminsen, Øssur Jacobsen (Marcello Marcellino, 54.)
NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen (Ken Nónklett, 89.), Arnfinn Langgaard, Pól Thorsteinsson, Christian Høgni Jacobsen – Gert Langgaard, Kári Hansen, Helgi L. Petersen, Ian Højgaard (Bergur Djurhuus, 79.) – Óli Hansen, Sonni L. Petersen

Veðrið hevur alt at siga

Í Kappróðrarfelagnum NSÍ vóna tey, at inntøkurnar fara at liggja um hálvt hundrað túsund krónur

KAPPRÓÐUR
Jóannes Hansen

Eingin ivast í, at kappingin verður spennandi á Skálafjørðinum í dag. Og tað átti at sæst aftur í áskoðarafjøldini, at Eysturoyingur á norðoyarstevnuni kom aftur á trónuna, eftir at hann hevur verið longri niðri á stiganum í tvey ár.

– Áhugin er stórur her hjá okkum, og tað vita vit, at hann eisini er aðra staðni. Um tað fer at siggjast aftur í fjøldini, sum fer at møta upp, valdast fyrst og fremst og í nógv størstan mun um veðrið. Royndirnar siga okkum, at um tað er turt og gott summarveður fyrrapartin leygardagin, so kemur nógv fólk til kappróður. Vit vóna tað besta, tí veðrið hevur verið so framúr gott í hesi vikuni.

Hetta sigur Sofus T. Hansen, sum er formaður í Kappróðrarfelagnum NSÍ. Hann sigur eisini, at teir hava fyrireikað seg so væl, sum tað ber til.

– Bátarnir verða settir omanfyri Lynfrost ella Fiskavirking, sum tað nú eitur, og róðrarfólkið fær eina máltíð í kantinuni á flakavirkinum.

Róðrarfelagið NSÍ hevur seinastu árini bygt neyst. Nú er tað liðugt, og har er alt tað, sum roknast kann við í hølum hjá ítróttarfelagi.

– Umstøðurnar í húsinum eru góðar. Eisini hjá róðrarfólkinum at fáa sær bað eftir lokna kapping. Tað eru tey hjartaliga væl komin til, sigur formaðurin.

Tá tað veit væl við, so kunnu inntøkurnar frá kappróðrinum á Skálafjørðinum koma upp í meiri enn hálvt hundrað túsund krónur. Hesa ferð eigur áhugin at vera stórur, tí tað hilnaðist so væl hjá Eysturoyinginum í Klaksvík.

– Sum eg segði, so hevur veðrið alt at siga, so vit vóna tað besta, sigur formaðurin í Kappróðrarfelagnum NSÍ. Umframt at hava ábyrgdina av fyrireikingunum, so er nevndarformaðurin aftur farin at rógva. Hann er millum teir, sum nú manna Nevið Reyða.

– Tá tú hevur róð, er tað torført at halda seg burtur. Í so góðum róðrarlíkindum, sum vit hava havt seinastu dagarnar, skal lítið til at lokka fyrrverandi róðrarfólk at fara aftur at venja, sigur Sofus T. Hansen, sum áður hevur verið við til at manna Eysturoyingin.